Tónleikur

VEGNA FLYTING
er ein hálvt ára gamalt televarpsmóttakari til sølu fyri hálvan prís.
Tlf. 314052

GUITARI TIL SØLU
John Petrucci Model P2. Má roynast. Skaffast aldrin aftur – 9.000,- v/ kuffert og lás til reim + 1 stk. leðurreim.
Tlf. 522012

NAD
stereo integrated amplifier 312. Prísuppskot 500 kr.
Tlf. 263733

ROLAND G600
Eitt 3 ára gamalt keyboard við fantastiskum hentleikum og ljóðum, incl. forsterkara og 2 stk. hátalarar til sølu. Nýprísur 18.300 kr. Til sølu fyri 6500 kr.
Tlf. 280607

HARMONIKA
mrk. Exelsion 960, Piano til sølu. Harmonikan hevur 41 tangentar, 5 kór, 120 bassar, 5 kór. Hon er vælegnað til at spæla m.a. musette og svensk/norskan harmonikutónleik.
Tlf. 224053

ROLAND G600
Eitt 3 ára gamalt keyboard við fantastiskum hentleikum og ljóðum, incl. forsterkara og 2 stk. hátalarar til sølu. Nýprísur 18.300 kr. Til sølu fyri 6500 kr.
Tlf. 280607

KLAVER TIL SØLU
Lítið brúkt hvítt klaver (Kawai) við stóli til sølu fyri 18.000 kr.
Tlf. 259343

TRUMMUSETT
Pearl Export, Chrome, árg. 2002 í góðum standi, Prísur 8.000.- 10" 12" 14" 16" 22" og 14" + kassar til alt setti, tom haldarir eru við. Áhugað kunnu ringja á
Tlf. 211215, Janus (Tórshavn)

Út- & Sjónvarp

PARABOLKASSI
til canal digital, 1 ára gamal, til sølu fyri 900 kr.
Tlf. 374046

PARABOLMÓTTAKARI TIL SØLU
Ein lítið brúktur parabolmóttakari av merkinumStrong SRT8500, nýprísur uml. 2500 kr. Selist fyri 1500 kr. kontant. Eisini selji eg tvey parabolhøvd fyri hálvan prís, av merkinum Digitaly, annað 5 db. hitt 3 db. Eg kann senda pr. postuppkrøv um ynskist ella avheintast hjá Magnus T. J. Johansen 470 Eiði.
Tlf. 423051 ella 213054

LÍTIÐ BRÚKT SJÓNVØRP
21' Nokia 980 kr., 25' Nokia 1480 kr. 1 árs garanti.
Tlf. 319544 ella 251160

TIL SØLU
Parabolskál og móttakari til sølu.
Tlf. 448176/253897

Ymiskt

ÁRLIGA JÓLASØLAN
hjá Eydnuni verður 20. november. Tilmelding áðrenn 13. nov. á tlf. 422856/217856. Avmarkað pláss.
Eydnan

SKÚRUR YNSKIST
Arbeiðs/uppihaldsskúrur ynskist til keyps, skjótast gjørligt. Mát skal vera uml. 2,5 x 7,0-8,0 m.
Tlf. 777075

PINKUBARNASVIMJING
í Eysturskúlanum. Nýggir bólkar byrja fríggjadagin 4. november 2005.
Pinkubørn 3 -7 mør. kl. 16.00.
Pinkubørn 7 -12 mør. kl. 16.30.
Lítil børn 18-26 mør. kl. 17.15.
Tekning áðrenn 28. oktober 2005. hoegni@kallnet.fo ella á tlf. 314820/319820. Majbritt Mohr
tlf. 314820 / 319820

PENSIONISTAFELAGIÐ Í HAVN
hevur TOMBOLA og ÚTSØLU í Losjuni, Tinghúsvegur 18, mikudagin 19. oktober frá kl. 16.00. Limirnir kunnu koma í Losjuna við lutum millum kl. 12.30 og 15.00.
Nevndin

GARAGA
til leigu á Argjum. Hon er ca. 8 x 3,50 m.
Tlf. 227745

ÁRSVEITSLAN
hjá Tórshavnar og Kollafjarðar Bátafeløgum verður tann 12. nov. 2005 kl. 19.00 í bygdarhúsinum í Kollafirði.Bussur koyrir ókeypis úr Vágsbotni kl.18.30. Atgongumerki keypast í Kunningarstovuni í Havn og íKjalnesbúðini.
Tórshavnar og Kollafjarðar Bátafeløg

KSR VEITSLAN
Ársveitslan hjá KSR verður 19. november kl. 19.00 í Glæmuni. Atgongumerkir verða seld í Glæmuni fríggjakvøldið 4. og 11. november frá kl. 19.00-20.00. Limir 220,- kr. Gestir 280,- kr.
Nevndin

GALLERÍ VÁGSBOTN
Um nóg høgt boð fæst, seljast myndir av J. Waagstein, Turid Vagstein, Frimot Joensen, Poulina Joensen, Rasmus Rasmussen, Kári Svensson, Frida Zachariassen, Bibi.
Gallerí Vágsbotn, tlf. 314293/214293

BOGASKJÓTIFELAGIÐ ØRVUR
Innandura venjingin byrjar aftur í viku 42. Vaksin týs- og hósdag kl. 19.00. Børn mikudag kl. 18.30.
Tlf. 210799

BRIDGE
Pláss er fyri einum pari afturat hóskvøld kl. 19.00. Vinarliga ring 580580 og melda til.
Havnar Bridgefelag

NAKRIR FERMETRAR AV
veggjaflísum tl baðirúm heilt bíliga til sølu ella fyri at koma eftir teimum.
Tlf. 313392

HARUHAGI TIL SØLU
Haruhagin Frammi við Gjónna verður seldur á uppboðssølu. Ring á tlf. 222794 millum kl. 20 og 21 og gev eitt boð
Tlf. 222794

ÁRASØLA
við nógvum og góðum vinningum verður hósdagin 27. okt. kl. 19.00 í Frelsunarherinum í Vági.
Frelsunarherurin

TIL SØLU
Eitt stórt og vakurt hestavognshjól til sølu.
Tlf. 504567

YNSKIST
Brúkt vindeyga 120 x 120. 1 stk. og 1 stk. 120 x 160 ynskist til keyps fyri sámuligan prís.
Tlf. 282741

GLASDISKAR
Tveir glasdiskar til handil/kiosk. 3 hæddir av skuffum. Hædd: 91cm, dýbd: 52cm, longd/breidd: 100cm og 150cm.
Tlf. 214463

ARGJAVEITSLAN 2005
verður leygarkvøldið 29.okt. kl. 19.00. Tekning hjá Johild Dulavík tlf. 315779/515779. Fróði Olsen 311299/219981. Avmarka atgongd.
Argja Bóltfelag/Argja Róðrarfelag

FRÁ FLOKSMONNUM
Okkara seinasti útidystur verður í Gøtu sunnudagin 16. okt. kl. 15.00. Tað hevði glett okkum, um øll tit, sum hava stuðlað okkum í ár koma við. Vit koyra úr Gundadali kl. 13.30.
Floksmenn

VINDEYGA YNSKIST
B: 50 cm. H: 100 cm. (útvendig mát). Má kunna latast upp.
Ring 219552 ella 316699 Jóhan

FÓTBÓLTSSPØL TIL SØLU
CM 01/02 - 50 kr. CM 4 - 100 kr. FIFA World Cup 2002 - 50 kr. FIFA 2003 - 50 kr. Football Manager 2005 - 200 kr. Ella øll fyri 300 kr.
Ring 214789

YAMAHA DVD SPÆLARI TIL SØLU
Yamaha S520-DVD spælari til sølu fyri 2000 kr.
Ring 214789

YNSKIST
Reklamupennar ynskjast.
Tlf. 226689

TIL SØLU
modelskip av slagnum Bremen 9 (pilitibátur) 1 m. langur er bygdur eitt sindur.
Tlf. 310433

BYRSA TIL SØLU
Ein 1 ára gomul Remington 1187 cal. 12. Hevur skotið eini 200-300 skot, til sølu. Ongan áhuga undir 8.000 kr.
Tlf. 223768

EITT FITT ÚTHÚS
Sera væl smíða. Er í góðum standi og sera væl egnað til ross og seyð, til sølu.
Tlf. 273097

HEILSANIR

Hip hip hurra. Hele vagur's hjerte bliver 70 år i dag d. 15. okt. 2005. SALOMA RISHAMMER (omman). Vi ønsker dig et kæmpe tillykke med fødselsdagen. Håber du får en rigtig dejlig dag. Håber du får mange gode år og altid vil bevare dit gode og smittende humør. Vi elsker dig. Et stort fødselsdagkram fra
Marcus Ivan og Anita

Zacharias Heinesen, listamálari

Gott við nýggjum og mennandi listaumhvørvi

FRAMSÝNING
Jan Müller
jan@sosialurin.fo

Hans Pauli Olsen og Zacharias Heinesen leggja seinastu hond á framsýningina, sum nú endar

Mynd Jan Müller

Í morgin er seinasti dagur, har alternativa heystframsýningin í høvuðsstaðnum er opin fyri almenninginum. Vit hava spurt ein av framsýnarunum, Zacharias Heinesen, hvussu tiltakið hevur eydnast og hvat framtíðin hevur at bjóða uppá.

– Vit listamálarar hava brúk fyri slíkum hølum. Listaskálin hevur líkasum ikki pláss fyri so nógvum at framsýna í senn. Vit mugu gera okkum greitt, at har er ikki pláss fyri hvørki heystframsýning ella várframsýning við so nógvum framsýnarum. Í Listaskálanum fer slík framsýning inn í ymisk høli, so har var eingin heild. Listaskálin er meira egnaður til einmans framsýningar. Og tað er hann góður til. Í listahøllini á Skipasmiðjuni ber til at hava eina heild sjálvt við nógvum framsýnarum, og tað er sera gott.

Zacharias heldur eisini, at tað hevur sína serstaka sjarmu at sýna fram í einum gomlum fabriksbygningi. Hetta er so heldur ikki ókent í øðrum londum, har listin eisini er livandi. At sýna fram á hesum nýggja stað minnir tí eisini um líknandi framsýningar í útlondum, har man brúkar gamlar bygningar. Kunnu slíkir gamlir bygningar ikki brúkast til annað, so kunnu teir oftani brúkast til listaarbeiði og framsýningar. Og hetta er einki verri enn tað heldur listamaðurin fyri.

Hann sigur víðari, at samanbera vit við t.d. Reykjavík, so hava teir eitt tjóðarsavn, sum hevur sínar framsýningar. Men har halda tey ungu serstakliga, at tað er ov traditionelt. Tey hava tí tikið í brúk eitt pakkhús niðri við havnina, og hetta tiltakið í Skipasmiðjubygninginum minnir um tað.

– Er hetta framsýningarstaðið komið fyri at verða?

– Tað vóni eg, men vit vita jú ikki, hvussu leingi vit kunnu vera her og nær eigararnir skulu brúka høllina aftur. Tí leita vit eisini alla tíðina eftir einum øðrum hóskandi hølum at hava til taks, tá og um vit missa hesi hølini. Vit eru annars sera fegin um at kunna vera í hølunum og kunnu vit eisini brúka tey at arbeiða ímillum framsýningarnar, so vildi tað verið frálíkt. Vil eisini veita eina serstaka tøkk vegna okkum øll til eigararnar av høllini.

– Hvussu so við framtíðini hjá teimum 14, sum nú sýna fram í listahøllini?

– Vit síggja okkum sum ein bólk eins og vit kenna tað frá serliga Danmark. Bara í Keypmannahavn finnur tú einar 10 tílíkar bólkar. So onnur í Føroyum hava eisini møguleika at skipa sínar bólkar. Zacharias Heinesen var so ein av teimum sokallaðu »útbrótarunum«, sum herfyri tók seg úr Listafelagnum, ið heldur til í Listaskálanum. Hann sær ikki hetta stig sum nakað óvanligt og negativt. Tvørturímóti heldur hann tað kunna vera mennandi fyri listina og listaumhvørvið. – Sjálvur havi eg hugsað henda tankan leingi. Eitt er so ein heyst- og ein várframsýning. Men sjálvandi skulu vit eisini hava gestir at sýna fram, tvs. ein útlendskan og ein føroyskan gest hvørt árið. Tað er so helst tað næsta tiltakið, sum liggur fyri framman. Hann er sum heild sera væl nøgdur við hesa fyrstu heystframsýningina har á staðnum og vónar at hon kann vera við til at stimbra og menna føroyska málningalist og aðra list við.

Anna og Sanna úr Klaksvík vórðu við til at seta sín dám á ferniseringina herfyri.

Mynd Jan Müller



Frá framsýningini í nýggja listaumhørvinum á Skipasmiðjuøkinum

Mynd Jan Müller